*Sp/f nr. 4271*

**SP/F NUMERO**

*Løggilt grannskoðaravirki*

*Klaksvíksvegur 77 · Postsmoga 144 · FO-710 Klaksvík · Telefon 455522-219741 · numero@olivant.fo*

# ABC Barnahjálp í Føroyum

## Ársfrásøgn 2010

## Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um ABC barnahjálp | 2 |
| Roknskaparátekning | 3 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 4 |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 |
| Rakstrarroknskapur og fíggjarstøða | 6 |

## Upplýsingar um ABC barnahjálp

| | |
|---|---|
| Navn: | ABC barnahjálp<br>v/ Rúnu Sivertsen<br>Box 163, Klaksvík |
| V-tal | 564 397 |

**Nevndin:**
Rúna Sivertsen, form.
Rúni Hentze, næstf.
Oluf Færø, skr.
Beinta H. Jacobsen
Hilda Viderø
Andrea Stórá
Maibritt Frederiksberg

**Grannskoðan:**
Sp/F Numero
*løggilt grannskoðaravirki*
Postrúm 144
FO-700 Klaksvík

## Átekning frá leiðslu

Ársfrásøgnin ger góðkend av nevndini í dag.

Tórshavn, hin   07.03.2012

Nevnd:

# Átekning frá óheftum grannskoðara

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá ABC barnahjálp fyri 2010.
Ársfrásøgnin er gjørd við støði í galdandi roknskaparreglum.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini**
Leiðslan hevur ábyrgd av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd samsvarandi reglurnar. Henda ábyrgd ber í sær, at felagið støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársfrásøgnin kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi grannskoðarareglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa eina grundaða sannføring um, at tað ikki eru skeivleikar av týdningi í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðaraprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan nýtir eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31.12.2010 og av úrsliti av virksemi felagsins í roknskaparárinum 2010.

Klaksvík, hin 07.03.2012

Sp/F Numero
*løggilt grannskoðaravirki*

Símun Absalonsen
*løggildur grannskoðari*

# Nýttur  roknskaparháttur

**Alment**
Ársfrásøgnin er tillagað ársroknskaparlógini.

**Rakstur**
Móttikin stuðul er inntøkuførdur og skuldarabókhald er ikki ført.
Bert goldin stuðul, gávur og stuðulsgjøld eru førd yvir raksturin.

**Fíggjarstøða**
Gjaldføri er upptikið til áljóðandi virði.
Leiðslan hevur upplýst, at ABC barnahjálp hevur onga skuld.

# Rakstrarroknskapur 2010

| | | 2009 |
|---|---:|---:|
| Stuðul □rakstur | 71.350,00 | 79.740,00 |
| Stuðul - bygging í Liberia | 0,00 | 10.450,00 |
| Stuðul - børn í Liberia | 242.822,00 | 160.315,00 |
| Innsavnan | 123.512,25 | 61.360,00 |
| Stuðul frá Føroya Landsstýri | 10.000,00 | 625.000,00 |
| Stuðul □skúlaútbúnaður | 0,00 | 0,00 |
| Stuðul - børn í Senegal | 162.595,00 | 152.975,00 |
| Stuðulstiltøk | 24.382,00 | 125.841,75 |
| Aðrar inntøkur | 22.018,50 | 31.648,50 |
| **Inntøkur íalt** | **656.679,75** | **1.247.330,25** |
| | | |
| Goldið til skúla í Liberia | 0,00 | 593.196,97 |
| Verkætlan - børn í Liberia | 302.301,57 | 170.009,78 |
| Stuðul - børn í Senegal | 239.557,25 | 233.520,91 |
| Annar stuðul | 0,00 | 41.800,30 |
| Smáamboð | 0,00 | 14.795,00 |
| Tiltøk ol | 0,00 | 27.019,74 |
| Telefon og internet | 70.195,46 | 35.895,99 |
| Skrivstovuhald og porto | 3.970,80 | 3.814,70 |
| Lýsingar | 4.982,50 | 1.101,52 |
| Ferðaútreiðslur | 77.566,08 | 59.993,00 |
| Ymiskt | 0,00 | 23.403,77 |
| Rentur | 10.725,84 | 0,00 |
| **Útreiðslur** | **709.299,50** | **1.204.551,68** |
| | | |
| **Nettoúrslit** | **-52.619,75** | **42.778,57** |

## Fíggjarstøða 31.12.2010

### AKTIV

| | | |
|---|---:|---:|
| Áogn í fíggjarstovnum | **16.432,54** | **69.052,29** |

### PASSIV

| | | |
|---|---:|---:|
| Eginogn: | | |
| Kapitalkonto primo | 69.052,29 | 26.273,72 |
| Rakstrarúrslit | -52.619,75 | 42.778,57 |
| Kapitalkonto ultimo | 16.432,54 | 69.052,29 |
| | | |
| Skuld til ognarar | 0,00 | 0,00 |
| | **16.432,54** | **69.052,29** |